## VIÐMERKINGAR

# Avsporaða debattin 2

**Virgar T. Dalsgaard**

Men hvussu hevur nú debattin verið í føroyskum bløðum – hava tíðindamenn borað í manipuleraðu oljutíðindunum undan fólkatingsvalinum, nei, nei tvørturímóti – teir hava lopið alla feðgapropaganda um og í staðin fyri hava teir tøvt og tvassað í tí, at Katrin Dahl Jacobsen varisliga samanbar Høgnalýsingina við fascistiska tíðindaflutningin í tretivunum. Hetta er avsporing í debattini so tað forslær!

Fyri at seta sær trumf á, hevur Ingi Rasmussen leitað sær akademiska assistancu.

Hann fær ein fólkalívs frøðing at úttala seg og hesin advokerar í ramasta álvara fyri, at blaðstjórar eiga at sortera tilfar og innføra censur. Hetta er ódemokratisk og óhugnalig tankagongd, og vit mugu takka okkara Skapara fyri, at vit *enn* hava demokratiska danska grundlóg at kroka aftanfyri, tí í henni stendur tað týðuliga, at eingin censurur má vera, men fult skrivi- og talufrælsi. Ein kann spyrja eftir hvørjum kriterium t.d. greinatilfar skal sorterast! Hvørjar meiningar og hvørjar hendingar mugu ikki lýsast til fulnar?

**Fleiri fólkaupplýsarar fonglast við debatt**

Navnframi fólkaupplýsarin harra Sjúrður Skaale hevur longu fyri einum tveimum árum síðani í oddagrein í blaðnum Fregnir hóttað við, at Jóannes Eidesgaard og fleiri aðrir andstøðumenn, sum vóru nevndir við navni, skuldu koma inn í geglið at sita. Hetta stóðst sjálvandi av tí, at tað, sum hesir menn skrivaðu, ikki dámdi harra SS. Hetta er óhugnalig tjóðveldisjura og rættarvilkor næstan sum í andiligum fongsli við fólkadómstóli. Vilja tjóðveldismenn seta politiskar mótstøðumenn fastar, verður trupult hjá teimum, sol eingi vit eru í donskum ríkisfelagsskapi og undir danskari grundlóg. Men SS fírdi ikki fyri at útpeika, hvørjir skulu fongslast, tá ið hann fær valdið.

Og aftur nú í sambandi við at Jóannes Eidesgaard hevur loyvt sær at tikið undir við og stuðlað Katrin Dahl Jacobsen í hennara atfinningum móti populismuni hjá varaløgmanni, soer SS beinanvegin í bløðunum og hóttir við, at nú skal Jóannes Eidesgaard í geglið at sita. Men hvat er hetta fyri pubertilur journalistikkur? Heldur SS seg hava fingið dómsvaldið í Føroyum? Heldur hann seg kunna avgera, hvør skal fongslast?

So leingi sum vit enn hava danska grundlóg við *fullum talu- og skrivifrælsi,* noyðist SS at finna seg í, at andstøðufólk kunnu brúka hetta frælsið, men vit eru sjálvandi eftirhondini fullvís í, at skuldi tann dagur komi, hvat Gud forbjóði, at fullveldisfólk einaferð fingu trúttað sína tjóðveldisgrundlóg ígjøgnum, so verður lítið persónligt frælsi eftir, og tá sleppa kanska SS & hansara líkar at avgera, *hvat* skal skrivast, og *hvør* skal inn at sita. Men so leingi vit sleppa undan tí karikatursamfelagnum og tí andiliga fongslinum, har bara fælsi verður fyri tey fáu og útvaldu loysingarfólkini, fara vit at halda fram við at skriva, sum vit halda vera rætt, og sum tað hóvar okkum. Soleiðis, og *so* trupult og strævið er demokrati, harra Skaale. Demokrati og rationell argumentatión hevur ongantíð riggað saman við chauvinistiskum tjóðveldistankum.

Soleiðis sum fullveldisliðið hevur týggjað sær ferð eftir ferð, eru vit nógv javnaðarfólk, sum fegnast um, at vit ikki noyðast at liva undir einari grundlóg, sum er smíðað av so djúpt ódemokratiskum høvuðkambum sum loysingarmonnum. Við henni vóru vit givin heilt upp fyri skutil!

Fremsti løgfrøðingur tjóðveldismanna gav okkum á sinni dømi um, hvussu tjóðveldisjura skuldi praktiserast, tá hann segði, at tað var betri at verða órættvíst dømdur av føroyingi, enn rættvíst dømdur av donskum dómara, og hvussu vorðið hevði verið við inhabiliteti kunnu vit meta um, tá vit líta at 5 ferðir fólkaríkari Íslandi.

**Fjølmiðar fjala veruleikan**

Í málinum um Katrin Dahl Jacobsen og Høgna hava føroyskir fjølmiðlar enn einaferð sett met í eskapismu frá bæði substansi og veruleika. Eitt pinkulítið lot í einum koppi, har Katrin Dahl Jacobsen associeraði til fascistiskar propagandametodur, varð blást upp til eina ódn av caribiskum dimensjónum við Hitleri og Goebbels sum høvuðshvirlum, hóast teir als ikki vórðu nevndir!

Hetta var ósympatiskur fjølmiðlaleikur, har teir sonnu høvuðsleikararnir, Hoydalsfeðgarnir, heilt sluppu undan at verða drignir út á pall og latnir úr. nei, í Føroyum avdúka fjøtraðir journalistar ikki høvuðkambar, teir verja ráðaríkar populistar, dyrka sína *danofobi* og halda hondina yvir maktmenniskjum!

Úr turbulentum fjølmiðlaleiki er SS tó tikin og vinnur einaferð enn á sær sjálvum við fleiri oljutunnulongdum, tá ið hann í *Fregnum* etablerar eitt óndskapsmát fyri løgtingsrøður, har hann fellur tann dóm, at oljurøðan hjá Katrin Dahl Jacobsen er av óndastu røðum higartil á Føroya løgtingi. Tá ið man hugsar um, hvussu nógvar grovar, fúlar og skendskar røður *har* eru hildnar seinastu 80 árini, er tað ótrúligt, at so ungur maður sum SS skal hava átikið sær hesa truplu analysu *at finna ta óndastu*! Tað er stórt arbeiði. Vit vita ikki eftir hvørjum leisti, hetta *malometur* (óndskapsmátari) hjá Sjúrða er uppstillað, men tað má vera tjóðveldismatematikk, tí eftir flestu manna tykki, so eru tjóðveldisrøðurnar á tingi, serliga fyri 40 árum síðani, ikki júst fríar fyri óndskap; eg vildi hildið, at tær sprongdu eitthvørt malometur! Endiliga disputerar hann seg fram til ta margháttligu konklusión, at Jan Müller rennur í somu politiskum fólkatingsørindum sum Høgni Hoydal, og tí eigur Katrin Dahl Jacobsen eisini at leggja Jan Müller undir fascistiska popaganda – hesi fjákutu ræsonnement hjá SS kunnu fáa sjálvt Erasmus Montanus at dvína sum orðklúgvara. Fyri psykisku heilsu SSar skyldu mugu vit vóna, at hann ikki trýr upp á sína vitleysu argumentatión!

Teir tríggir hava sjálvandi sín fulla rætt til at liggja á knæ og vera meira enn vanliga forliptir í bæði Hoydalsfeðgunum, fullveldi og tjóðveldisflokkinum, og teir mugu eisini hjartans fegnir skriva um sítt forelskilsi og halda drúgvar røður, men teir kunnu bara ikki krevja, at føroyski veljarin generelt skal hava akkurát somu uppfatan ella kenslur sum teir. Teir mugu góðkenna, at meginparturin av fólkinum als ikki er forliptur! Skepsis, kritikkur og ósemja eru danskt grundlógartryggjað rættindi, sum vit onnur seta stóran prís uppá! Teir elska og friða fullveldi og feðgapolitikki – tað ger føroyski veljarin ikki!

Javnaðarkvinnan Katrin Dahl Jacobsen skal eiga stóra tøkk fyri, at hon hevur *civile courage*, sum fjølmiðlajassarnir ikki hava! Hon prikaði aftur eitt hol á tær innantómu sápubløðrurnar hjá Høgna Hoydal! Tað var helst tí, at landsfundur javnaðarfloksins í farnu viku fagnaði henni bæði við lógvabresti og øðrum ovatiónum!

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3685
**Navn:** Sp/f KM Smíð
**Adressa:** Smærugøta 15, 100 Tórshavn.
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 08.12.2003
**Viðtøkudato:** 08.12.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** Kristian Michelsen, Smærugøta 15, 100 Tórshavn og Louisa Michelsen, Smærugøta 15, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Kristian Michelsen, Smærugøta 15, 100 Tórshavn og Louisa Michelsen, Smærugøta 15, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjórunum hvør sær.
**Grannskoðari:** Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Paturssonargøta 18, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 08.12.2003 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka byggivirksemi, handverk, at umsita, leiga og eiga fasta ogn, keyp, søla og annað virksemi í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 9. desember 2003*

*Kristin Balle*








# Leiðari
## til handilin hjá P/F Frants Restorff

Søkt verður eftir dagilgum leiðara til handilin hjá P/F Frants Restorff. Talan er um ein miðalstóran handil, ið eisini selur bakaravørur. Fyri rætta persónin er hetta eitt sjálvstøðugt og spennandi starv, har tú hevur dagligu leiðsluna av handlinum og starvsfólkunum um hendi.

Miðað verður tí ímóti at tann, ið settur verður í starvið:

- Kann arbeiða sjálvstøðugt
- Hevur evni at skipa fyri og hevur góð samstarvsevni
- Hevur viðkomandi útbúgving ella
- Hevur royndir innan leiðslu

Løn sambært avtalu.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til P/F Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe.

Skrivlig umsókn skal sendast til P/F Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe innan 31. desember.

**RASMUSSEN & WEIHE**
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
**An associated firm of** PricewaterhouseCoopers

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 351700
Fax (+298) 351701

Sp/f nr. 267
e-mail: rasmussen@rasmussen.fo
Http://www.rasmussen.fo


# Kunngerð

Gjørt verður kunnugt, at vallistarnir til løgtingsvalið, sum verður tann 20. januar 2004, liggja frammi til alment eftirlit á býráðsskrivstovuni í vanligari avgreiðslutíð:

**frá hósdegnum 11. desember til hósdagin 18. desember 2003,**

báðir dagar íroknaðir.

Kæra, um at onkur ikki er komin á listan ella at onkur av órøttum er tikin við, skal í seinasta lagi:

**týsdagin 23. desember 2003**

verða latin býráðnum, sum kannar og tekur avgerð í málinum.

Klaksvík tann 10. desember 2003

**Klaksvíkar Býráð**

veitst tú ikki tað?




## Góðir brúktir bilar

| | |
|---|---|
| **Nissan Almera 1.4 S** gráur, árg 1999, 5 hurðar, km. 48.000 — **97.000** | **Opel Astra 1.6 Comfort** svartur, árg 1998, 5 hurðar, km. 77.000 — **95.000** |
| **Nissan Almera 2.0 Diesel** vínreyður, árg 1999, 4 hurðar, km. 61.000 — **nú 89.000** | **Opel Vectra 1.7 DT** grønur, árg 1995, 4 hurðar, km. 210.000 — **65.000** |
| **Nissan Almera 1.6 GX** vínreyður, árg 2000, 4 hurðar, km 88.000 — **nú 95.000** | **Opel Vectra 1.7 DT** reyður, árg 1996, 4 hurðar, km. 195.000 — **79.000** |
| **Peugeot 306 Diesel Turbo** gráur, árg. 1995, 4 hurðar, fyrr 65.000,- km. 206.000, toppstykkið skift — **nú 45.000** | **Opel Vectra 1.7 DT** bláur, árg 1996, 5 hurðar, km. 125.000 — **85.000** |
| **Peugeot 406 1.8** grønur, árg. 1997, 4 hurðar, km. 129.000 — **99.000** | **Ssangyong Musso 2.9D 100 HK Van** grønur, árg 1997, 5 hurðar, km. 102.000 — **130.000** |
| **Peugeot 406 ST 2.0 Hdi v/aircon** vínreyður, árg. 1999, 4 hurðar, km. 120.000, fyrr 145.000,- — **nú 135.000** | **Ford Fiesta 1.3** reyður, árg 1997, km. 88.000 — **46.000** |
| **Opel Agila** grønur, árg 2001, 5 hurðar, km. 36.000, fyrr 110.000,- — **95.000** | **Ford Escort 1.8d** bláur, árg 1997, 5 hurðar, km. 127.000, fyrr 57.000,- — **nú 35.000** |
| **Opel Astra 1.6 Station car** hvítur, árg 1996, 5 hurðar, km. 61.000 — **68.000** | **Ford Escort 1.8** bláur, árg 1995, 4 hurðar, km. 101.000 — **59.000** |
| **Opel Astra 1.6 16V Stc** gráur, árg 1999, 5 hurðar — **110.000** | **Ford Orion 1.8 Diesel** bláur, árg 1991, 4 hurðar, km. 131.000 — **25.000** |
| **Opel Astra 1.6** beige, árg 1996, 4 hurðar km. 109.000, verður seldur fyri kunda — **58.000** | **Mazda E-serie 2200 Diesel** gráur, árg 2002, 5 hurðar, km. 17.000, skrásettur sum persónbilur — **v/mvg 175.000** |
| **Opel Astra 1.7 DT** grønur, árg 1997, 4 hurðar — **65.000** | **Toyota Corolla 1.3 XLi** reyður, árg 1997, 3 hurðar, km. 79.000 — **67.000** |
| **Opel Astra 1.7 DT** grønur, árg 1999, 5 hurðar, km. 97.000 — **119.000** | **Toyota Carina E 1.6** hvítur, árg 1995, 4 hurðar, km. 138.000 — **67.000** |
| | **Toyota Corolla 1.6 Star Linia Terra** grønur, árg 2002, 5 hurðar, km. 18.000, seldur fyri kunda — **160.000** |

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Fyrispurningar kunnu vera settir á telefon 34 54 00,
eisini ber til at senda teldupost til: nissan@nissan.fo
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

Sosialurin 341800

**P/F Meinhardt Arge**
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61






Kom og steðga vónloysinum

Kom og ver við at fría samvitskufangar, forða avrættingum og steðga píning. Kom og Skriva fyri lívi.

amnesty international
www.amnesty.fo


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3686
**Navn:** Sp/f Klaksvíkar Byggivirki Lastbilar
**Adressa:** Marknavegur 4, 700 Klaksvík.
**Kommuna:** Klaksvíkar Kommuna
**Stovningardato:** 01.12.2003
**Viðtøkudato:** 01.12.2003
**Kapitalur:** Kr. 90.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 90.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** Páll Josephsen, Marknavegur 4, 700 Klaksvík, Sjúrður Josephsen, Jørundsgøta 12, 700 Klaksvík og Álvur Josephsen, Undir Fossum 60, 700 Klaksvík.
**Nevnd:** Páll Josephsen, Marknavegur 4, 700 Klaksvík (formaður), Sjúrður Josephsen, Jørundsgøta 12, 700 Klaksvík og Álvur Josephsen, Undir Fossum 60, 700 Klaksvík.
**Stjórn:** Sjúrður Josephsen, Jørundsgøta 12, 700 Klaskvík.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av stjóra og nevndarformanni í felag.
**Grannskoðari:** P/F Føroyabók, Vágstún, Box 144, 700 Klaksvík.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 01.12.2003 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er flutningur, tænastur, keyp og søla og annað starv í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 10. desember 2003*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. 3088, Veba Oil & Gas Faroes Branch, Filial av Veba Oil & Gas GmbH., 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:** 02.05.2002.
**Nýtt navn:** Petro-Canada Faroes GmbH, Faroe Branch.

*Skráseting Føroya tann 9. desember 2003*

*Kristin Balle*




## Føroyahúsið í Keypmannahavn søkir
# fólk til kaffistovuna
## avloysari fyri barsil í 1/2 ár

**Vit søkja eftir einum tímaløntum fólki k/m, sum kann arbeiða fulla tíð í kaffistovuni – ein blekksprutta ella høgguslokkur – og**

- dugir at matgera føroyskan og annan mat og at baka
- hevur áhuga fyri vælferð og trivnað hjá gestunum
- er sjálvbjargin, álítandi, tolin og kreativ/ur
- er hugað at samstarva við øðrum fólki og sjálvbodnum í húsinum
- kann laga seg eftir skiftandi arbeiðstíðum og kvøldarbeiði
- hevur áhuga fyri føroyskum viðurskiftum

Kaffistovan í Føroyahúsinum er miðdepilin í húsinum, hagar fólk leita sær innar at lesa bløð, lána bøkur og keypa sær ein drekkamunn. Men teimum dámar eisini væl at fáa okkurt vælsmakkandi heimabakað afturvið. Javnan eru eisini tiltøk, veitslur ella útleigur, har døgverði ella sjálvtøkuborð er ein týðandi partur og har tú ert í fremsta rað at gera til, servera o.a.

Vit hava kokk til tiltøkini.

Vend tær til leiðaran í húsinum um upplýsingar um starvið. Starvið er leyst frá um 12. januar til 10. juli. Tlf. +45 33231587 ella postur@faroehouse.dk

**Føroyahúsið í Keypmannahavn**
**Vesterbrogade 17 A**
**1620 københavn V**



# Starvslýsingar á www.portal.fo

**Kostnaður:** (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

**Kostnaður:** (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

**2 lýsingar = -20% í avsláttri**
**3 ella fleiri = -30% í avsláttri**

Sosialurin
tel 341800 · fax 341801
teldupostur: lysing@sosialurin.fo


www.sosialurin.fo